	JARÐARLÓGIR (verandi lóg)	FERÐAVINNULÓGIN (uppskot)
RÆÐISRÆTTUR	Bóndin ella røktingarmaðurin	Landsstýrismaðurin, tá tað kemur til skarpskeringar
EFTIRLIT AV FERÐAFÓLKI	Bóndin ella røktingarmaðurin	Einki eftirlit
HANDILSFERÐAVINNA	Bóndin ella røktingarmaðurin	Landsstýrismaðurin, tá tað kemur til skarpskeringar
FERÐAVINNUÆTLAN	Bóndin ella røktingarmaðurin skulu geva samtykki	Landsstýrismaðurin, tá tað kemur til skarpskeringar
GONGUGJALD	Eigari ella festibóndi kann taka gongugjald, sum er at rokna sum lunnindi	Bann sett eigara ella festibónda at taka gongugjald
ALLÝSING	Viðgjørt í jarðarlógum	Grein 2
GONGURÆTTUR	Samtykki frá eigara ella festibónda	Grein 3 og landsstýrismaðurin
SERSTØK NEVND HJÁ HEIMAFÓLKI	Samtykki frá eigara ella festibónda	Grein 7 og landsstýrismaðurin
VAL AV NEVND HJÁ HEIMAFÓLKI		Grannastevna er avmarkað til markatalsbygdir og ikki kommunur
NÝGGJAR FARLEIÐIR	Samtykki frá eigara og festibónda, ella má jørðin keypast ella ognartakast	Kommunan hevur ábyrgdina, men landsstýrismaðurin hevur avgerandi orðið, tá tað kemur til skarpskeringar
SKILHALDSREGLUR	Eigari og festibóndi. Hægsti myndugleiki er yvirlandbúnaðarstevnan	Kommunan ger uppskot til skilhaldsreglur, men landsstýrismaðurin tekur avgerð. Hægsti myndugleiki?
YVIRTØKA/OGNARTØKA	Eigari og festibóndi eru vardir av grundlógini. Ognartøka kann bara fremjast ímóti fullum endurgjaldi. Tað kann ikki avmarkast til landbúnaðarendamál	Eigarin skal biðja um yvirtøkur ella ognartøku, grein 10

TRYGD	Eigari og festibóndi	Landsstýrismaðurin ásetur reglur
FERÐALEIÐARI	Eigari og festibóndi kunnu krevja ein staðkendan ferðaleiðara	Ongin ferðaleiðari. Ganga frítt, grein 3. Landsstýrismaðurin kann krevja ferðaleiðara, grein 11, í vandamiklum øki
VEÐURLÍKINDI	Eigari og festibóndi kenna veðurlíkindi betri enn nakar annar í teirra haga	?
FJALLGONGA	Eigari og festibóndi avgera, nær farið verður á fjall. Er ivaveður, kunnu fleiri vikur ganga, áðrenn farið verður á fjall. Fjallgonga er 3 ferðir um árið, umframt at tað ofta verður tikin seyður uttanrættað eftir fjalltíð	Sambært grein 12, stk. 4, ásetur landsstýrismaðurin reglurnar í sambandi við fjallgongu
HARUTÍÐ	Eigari og festibóndi selja hagan til harumenn í november og desember	Landsstýrismaðurin ásetur reglurnar í sambandi við haruskjóting
LEMBING	Eigari og festibóndi avgera, at fólk ikki ganga í haganum í lembingartíð, sum er umleið 6 vikur um várið	Landsstýrismaðurin ásetur reglurnar í sambandi við lembing
HEIÐAFUGLUR REIÐRAST	Eigari og festibóndi avgera, at fólki ikki ganga í haganum, har fuglurin reiðrast	Landsstýrismaðurin ásetur reglurnar í sambandi við, at fuglurin reiðrast
SKELTING	Eigari og festbóndi brúka sjáldan skelti í høgunum. Skelti geva onga meining, tá bíðað verður eftir fjalllíkindum í vikur	Landsstýrismaðurin áseturnar reglurnar í sambandi við skelting
BURTURTØKA	Eigari og festibóndi avgera sjálvir, hvat skal fara fram á teirra ogn	Politiið fær heimild til at áleggja bøtur á privatari ogn
KÆRUMYNDUGLEIKI	Landbúnaðarstevna og yvirlandbúnaðarstevna	?
GRUNDLÓGIN, GREIN 73	Jarðarlógirnar eru í samsvari við grundlógina	? Í ávísum førum er talan um ognartøkuinntriv við endurgjaldsábyrgd fyri tað almenna

GRUNDLÓGIN, GREIN 72	Jarðarlógirnar eru í samsvari við grundlógina	? Grundlógin sigur antin samtykki frá eigarunum ella rættarúrskurð
GONGURÆTTUR HJÁ FØROYINGUM	Føroyingar ganga frítt eftir einari pragmatiskari umsiting av galdandi lóggávu. Sambært uppskoti til stjórnarskipan, grein 22	Ferðafólk ganga frítt, grein 3